gult cyan magenta svart

Hósdagur 8. februar

SVF

18.00 Tá feittið skal burtur – um venjingar og motión
18.30 Jumanji 2
19.00 Urið hjá Bernardi 2:5
19.15 Oggy og kakkulakk arnir - teknifilmur
19.30 Expedition 2000 – um jólaskipið (e)
20.00 Dagur og Víka við Grannum okkara
20.50 Hotellið 9 – donsk dramarød
21.30 Starvsnæmingurin – donsk dokumentarsending
22.00 Krimitímin: Dalziel og Dafoe 1:2 – ensk rød
22.50 DR-Dokumentar: Søgur av einari politistøð
23.50 Liðugt

EURO SPORT

07:30 Xtreme sports
08:30 Alpine skiing
09:00 Live alpine skiing
10:00 Alpine skiing
11:00 Car racing
11:30 Olympic games
12:00 Alpine skiing
12:30 Live alpine skiing
13:30 Biathlon
14:30 Speed skating
15:00 Car on ice
16:00 Xtreme sports
17:00 Xtreme sports
17:30 News
17:45 Alpine skiing
18:30 Football
20:00 Football
21:00 Rally
21:30 Alpine skiing
22:00 News
22:15 Football
23:15 Rally
23:45 Alpine skiing
00:15 News
00:30 Close

BBC PRIME

00.00 TLZ: »American Visions – The Republic of Virtue«
01.00 TLZ: »Science at War – Full Spectrum Dominance«
02.00 TLZ: »What have the 60s ever done for us?«
02.10 TLZ: »Background Brief - Impact – Planet Earth«
02.30 TLZ: »Life on a Thread«
03.00 TLZ: »Stress«
03.30 TLZ: »Looking-Glass World«
04.00 TLZ: »Talk Spanish«
04.15 TLZ: »Talk Spanish«
04.30 TLZ: »Science in Action – Mixtures«
04.50 TLZ: »Back to the Floor – A Copper's Lot«
05.30 TLZ: »Look Ahead«
06.00 Bodger and Badger
06.15 Playdays: »The Patch Stop«
06.35 Run the Risk
07.00 The Really Wild Show
07.30 Ready, Steady, Cook
08.00 Style Challenge: »Grease«
08.25 Real Rooms
08.50 Going for a Song
09.30 Top of the Pops Plus
10.00 Antiques Roadshow
10.30 TLZ: »The Face of Tutankhamun – The Pharaoh Awakes«
11.30 Looking Good
12.00 Ready, Steady, Cook
12.30 Style Challenge: »Friends at Forty«
13.00 Doctors: »Clear View«
13.30 EastEnders
14.00 Real Rooms
14.25 Going for a Song
15.00 Bodger and Badger
15.15 Playdays: »The Patch Stop«
15.35 Run the Risk
16.00 The Really Wild Show
16.30 Top of the Pops Global
17.00 Home Front
17.30 Doctors: »Sex, Lies and Red Tape«
18.00 EastEnders
18.30 Castaway 2000
19.30 The Boss: »Bank Holiday«
20.00 Casualty: »If You Go Down to the Wards Today«
21.00 How Do You Want Me?
21.30 Top of the Pops Global
22.00 Great Expectations
23.35 Dr Who: »Time-Flight«

BBC WORLD

00.00 BBC News
00.30 Holiday
01.00 BBC News
01.30 Reporters
02.00 BBC News
02.30 Asia Today
02.45 World Business Report
03.00 BBC News
03.30 HARDtalk
04.00 BBC News
04.30 Waterworld
05.00 BBC News
05.30 Reporters
06.00 BBC News
06.30 HARDtalk
07.00 BBC News
07.30 Simpsons World
08.00 BBC News
08.30 HARDtalk
09.00 BBC News
09.30 Holiday
10.00 BBC News
10.30 Simpsons World
11.00 BBC News
11.30 HARDtalk
12.00 BBC News
12.15 World Business Report
12.30 Waterworld
13.00 BBC News
13.30 Simpsons World
14.00 BBC News
14.30 Asia Today
15.00 BBC News
15.30 HARDtalk
16.00 BBC News
16.15 World Business Report
16.30 Talking Movies
17.00 BBC News
17.30 World Business Report
17.45 World Sport
18.00 BBC News
18.30 HARDtalk
19.00 BBC News
19.30 Click Online
20.00 BBC News
20.30 World Business Report
21.00 BBC News
21.30 Panorama
22.00 BBC News
22.30 World Business Report
22.45 Asia Today
23.00 BBC News
23.30 HARDtalk

3 SKASI

05:30 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:35 Garfield og venner
09:00 Alias Smith & Jones
10:00 Træneren
10:30 Horton-sagaen (G)
11:20 Horton-sagaen
12:10 Melrose Place - classic
14:05 Vild med dig
13:30 Panter-tanter
14:00 Mig og fremtiden
14:55 Baywatch
15:45 Min kære familie
16:10 Ricki Lake
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Med på moden
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Baren
19:00 Torsdagsbio: Karate Kid 4
21:00 Heksene fra Warren Manor
21:55 Action
22:25 Baren (G)
22:55 Dagens Nyheder på TV3
23:05 Ti tommelfingre
23:35 Strømer i L.A.
00:05 Nash Bridges
01:00 Kojak
02:00 Drøm videre
02:30 Simpsons
02:55 Ricki Lake (G)
03:55 Godnat

ÚTVARP FØROYA

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Inga Poulsen Dam, prestur, lesur
07.15 Barnaløtan Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin Hesa vikuna leggja Hilmar Jan Hansen, Kári Olsen og Jákup Magnussen til rættis
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlestur (e) Inga Poulsen Dam, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Hjá dvørgum í Níðafjøllum (e) Hans Tórgarð lesur 3. part av framhaldssøgu eftir Annfinni í Skála
11.30 Undir dagurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Dagurðatónar
13.00 Heimurin í dag (e) Suni Merkistein leggur til rættis
13.30 Tónleikur
14.00 Fimmarin (e) Sigmar Bláberg leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Vangamynd Annlis Bjarkhamar og Jóhannes Miðskarð leggja til rættis
17.00 Tíðindini
17.05 Í Víngarðinum Símun J. Hansen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e) Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

Rás 2 FM 102 FM 107

10:45 Orðið Bibliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi & Lýsingar
13:00 Leysløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi og lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Laila Beinleiðis Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17:00 Barnarásin (e)
18:00 Tíðindi og lýsingar
18:15 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini "Rikidømi í Kristusi" EVR-sending Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og lýsingar
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo

Lindin FM 91,9

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin, vertur er M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch, ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.05 "The Finishing Touch" heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Møti kunngeðir fyri komandi vikuskifti.
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevnu kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379. Vertur: Jenis av Rana Vit gevast uml. middnátt

Starvsnæmingurin 1:6

– djóravinurin í starvslæru hjá granskaranum

SVF Hóskvøldið kl. 21.30

Ein djóravinur, sum finst harðliga at at brúka royndardjór, skal í eina viku vera starvsnæmingur hjá einum granskara, sum m.a. ger royndir við hundum, fyri at lekja sjúkur hjá fólki. Tað er lagt upp til ein samanbrest og tjak, tá djóravinurin Anette Røpke er hjástødd, tá læknin Niels Sandgaard ger royndir við hundum sínum.

Á sanganna veingjum

Hóskvøldið kl. 20.30

Í hesi sending skulu vit hoyra tey bæði Eivør Pálsdóttir og kenda svian Anders Glenmark syngja egnar sangir.

Gunnvør Poulsen stílar fyri

Karate Kid 4

– Amerikanskt drama frá 1994



3 Hóskvøldið kl. 19.00

Karate-Kid røðin fær eina vend, tá Miyagi fær ein nýggjan næming. Hesuferð snýr tað seg um ta foreldraleysu og vónbrotnu ungu gentuna, Julie.

Síðan foreldur hennara lótu lív í eini syrgiligari ferðsluvanlukku, hevur Julie ikki viljað havt samband við onnur. Omma hennara er ein av vinunum hjá Miyagi, og hann fer at gera eina royndar at hjálpa Julie, sum hevur trupulleikar við at klára tað í skúlanum, har hon verður argað av tí ræðuliga Ned.

ítróttur

Nr. 23 • fríggjadagur • 2. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Arbeiðið er nú hjá feløgunum

Tað er av alstórum týdningi, at vit í samstarvi við feløgini nú fáa bygt venjingarstøðuna hjá leikarunum upp, sigur Allan Simonsen, sum annars var væl nøgdur um dystin í Svøríki

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Undan dystinum vóru tað helst fleiri, sum bóru ótta fyri, at føroyska liðið skuldi renna seg inn í rættiligt skrædl. Hetta tí venjingarnar runt í landinum ikki eru meira enn byrjaðar, og at spælararnir tískil ongan møguleika hava at vera í fullari venjing.

Allan ásannaði sjálvandi eisini, at enn restar nógv í, áðrenn spælarar hansara eru í fullum snúningum, men legði samstundis áherslu á, at júst ein slíkur dystur er sera hentur í so máta.

– Vit hava tørv á at koma tíðliga igongd við venjingina, og hetta er serliga aktuelt í ár, tá fyrstu undankappingardystirnir eru longu í mars mánaði. Hetta er sjálvandi eitt skump tann vegin, men samsundis er tað av avgerandi týdningi, at vit gjøgnum feløgini fáa bygt venjingarstøðuna hjá leikarunum upp, so teir eru til reiðar, tá dystirnir av álvara fara at telja.

Um dystin sjálvan var Allan annars sera væl nøgdur.

– Lat meg fyrst og fremst siga, at eftir mínum tykki kundi úrslitið farið báðar vegir. Sviar høvdu sera gott tak á í fyrra hálvleiki, men vit spældu ein góðan seinna hálvleik, har vit við eitt sindur av hepni kundu avgjørt dystin. Tað er jú altíð soleiðis, at hóast talan er um venjingardyst, so vil mann sum spælari og venjari altíð royna at fáa eitt so gott úrslit sum gjørligt.

– Umframt úrslitið, so eru tó eisini fleiri aðrar positivar síður við dystinum. Eitt nú fekk eg høvi at síggja fleiri av ungu evnaríku leikarunum royna seg í á vøllinum. Fekk at síggja, hvussu hugburður teirra var, nú teir royndu seg í landsliðsbúnanum, og eg má siga, at eg eri nøgdur um tað, sum eg sá.

Spurdur um avrikið hjá nøkrum av nýggju monnunum var somikið gott, at onkur av hesum longu hevur spælt seg inn í hópin, svarar landsliðsvenjarin, at tað er tað dekan ov tíðliga at siga nakað um nú.

– Enn er so stutt fráliðið á árinum, at einki er fastlagt í so máta. Tað er tó einki at ivast í, at ungu leikararnir eisini framyvir verða við í myndini kring landsliðið. Vit hava jú yvir eitt longri tíðarskeið fylgt við, hvussu menningin hjá leikarunum hevur verið, og teir hava eisini verið við til landsliðssamlingar, har vit hava havt høvi at hyggja nærri at hesum.

– Tað er út frá samlaða úrslitunum av hesum lutum, at vit so gera okkara metingar um, hvørt leikarin kann koma inn og styrkja hópin.

Landsliðsvenjarin sigur, at týdningarmesti setningurin nú er at fáa venjingarstøðuna hjá leikarunum nóg góða

Bólturin er hjá feløgunum

Knappliga tveir mánaðir eru til fyrstu undankappingardystirnar, og vit spurdu at enda Allan Simonsen, hvussu fyrireikingarnar upp til hesar dystirnar verða.

– Fyrst og fremst fara leikararnir sjálvandi aftur til tey feløg, har teir hava sína dagligu gongd, og har verður týdningarmesti setningurin at fáa venjingarstøðuna í lagi. Sum so er hetta ikki mín uppgáva, men tað er av alstórum týdningi, at vit í samstarvi við feløgnini geva leikarunum neyðugu venjingina.

– Vit fara so í venjingar- og steypadystum at fylgja einstøku leikarunum, soleiðis at vit kunnu meta um, hvussu teir eru fyri, og so hava vit sjálvandi eisini venjingarleguna í Spania, sum er seinasti liður í fyrireikingunum, sigur Allan Simonsen at enda.

Vilja hava mál

Svenski landsliðsvenjarin var vónbrotin um, at tað ikki eydnaðist liði hansara at vinna dystin móti føroyingum

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Hóast hann saman við starvsfelagnum, Lars Lagerbäck, hevði sent eitt sera ungt lið á vøllin, so hevði Tomy Söderberg roknað við at vinna dystin mikukvøldið.

Hetta tykist vera greiðasti boðskapurin, sum var at síggja í svensku fjølmiðlunum hósmorgunin.

Skaptu nógv

At svenski venjarin var vónbrotin eftir dystin, komst eina mest av, at tað ikki eydnaðist leikarum hansara at skora upp á okkurt av góðu tilboðnum, sum teir fingu. Tað besta, tá Jákup Mikkelsen vardi fyri brotssparki.

Hinvegin var svenski venjarin sera nøgdur við, at tað eydnaðist liði hansara at skapa fleiri góðar málmøguleikar.

– Onkur vil siga, at 4-2-3-1 er eitt meira verjukent útgangsstøði enn vanliga 4-4-2 uppstillingin, men tað eri eg als ikki samdur í. Vit fingu fleiri góðar djúpar renningar av miðvøllinum, men enn skulu vit hava síðubakkarnir longur niðan á vøllin, so innleggini kunnu gerast fleiri.

Hvussu var og ikki, so staðfesti svenska pressan eftir dystin, at alt var, sum tað plagdi at vera: Sviar hildu væl um í verjupartinum, men megnaðu hinvegin ikki at skapa nóg nógv, og tí varð úrslitið enn einaferð 0-0.

Nýggja nýtt

At svensku landsliðsvenjararnir nú hava roynt fleiri nýggjar ungar leikarar, mest sambært svensku pressuni ikki bert av, at teir vilja síggja hesar leikarar í blá-gula búnanum.

– Vit hava tørv á tekniskt góðum leikarum, sum megna at skapa nakað sjálvir. Nakað soleiðis byrjar Aftonbladet sína grein við áskoðanini um nýggju leikararnar.

Ítróttaskrivararnir á blaðnum vísa á vánaliga avrikið hjá Svøríki undir EM-endaspælinum í fjør, og vilja vera við, at fremsta uppgávan hjá nýggja venjararparinum er at skapa eitt lið, sum betri er ført fyri at spæla framrættaðan fótbólt.

Næsta uppgávan hjá svenska landsliðnum verður ein ferð til Thailands, har enn fleiri leikarar sleppa at royna seg. Ætlanin er, at venjararnir skulu hava roynt eini 50 leikarar, tá seinasti venjingardysturin í vár, móti Malta í februar, verður á skránni.

Eftir hetta kemur álvara í, og skal Svøríki spæla seg til HM endaspælið, er kravið tveir sigrar í undankappingardystunum í mars mánaði. Tá skulu sviar á heimavølli royna seg móti ávíkavist Makedonia og Moldava.